# Innboðin lisitatión sum marknaðargrundað útlutingarskipan

Ólavur Gregersen & Magni Laksáfoss
Kveikjarafundur um fiskirættindi og fígging, 5. apríl 2016

SYNTESA
INNOVATION TO MARKET


Tann strategiska avgerðin
“Allur fiskiskapur skal verða lívfrøðiliga, búskaparliga og samfelagsliga burðardyggur”
Fiskivinnu nýskipan
Hvussu koma vit hagar?
Hvar
Hvussu
Nú
Hvar vilja vit verða í framtíðini?

# Støðan í dag í mun til burðardygd

- Uppisjóðarvinna og botnfiskaveiða á fjarleiðum:
  - Livfrøðiliga
  - Búskaparliga
  - Samfelagsliga


VINNAN

10

Greining: Fýra stórar fiskivinnufyritøkur

**Skapað meir enn 600 nýggj arbeiðspláss**

- Botnfiskaveiða undir Føroyum:
  - Livfrøðiliga
  - Búskaparliga
  - Samfelagsliga

© SYNTESA PARTNERS & ASSOCIATES – INNOVATION TO MARKET

# Skrá

- Stutt gjøgnumgongd av ástøði
- Tilfeingisrenta
- Ymiskar útlutingarskipanir
- Innboðin lisitatión
- Uppboðssøla

© SYNTESA PARTNERS & ASSOCIATES – INNOVATION TO MARKET

# Stutt gjøgnumgongd av ástøði




© SYNTESA PARTNERS & ASSOCIATES – INNOVATION TO MARKET

# Stutt gjøgnumgongd av ástøði




© SYNTESA PARTNERS & ASSOCIATES – INNOVATION TO MARKET

# Tilfeingisrenta

**Nakrar niðurstøðu**

- at tilfeingisrentan einans kemur vinnuni og samfelagnum til góðar um fiskiskapurin er skipaður soleiðis at hóskandi tal av skipum er í fiskiskapinum og at stovnsrøktin er í lagi
- at ein treyt fyri at tilfeingisrentan er til staðar er, at skipatalið verður avmarkað og hildið á hóskandi støði
- at ein lækking av kostnaðarstøðinum í fiskiskapinum vil hava við sær eina øking av tilfeingisrentuni
- at ein víðkan av stovnsgrundarlagnum vil hava við sær eina øking av tilfeingisrentuni
- at ein virðisøking av veiðini vil hava við sær eina øking av tilfeingisrentuni

© SYNTESA PARTNERS & ASSOCIATES – INNOVATION TO MARKET

# Tilfeingisrenta

**Tað er til fyrimuns fyri vinnu og samfelag:**

- at tilfeingisrentan gerst størst møgulig
- at vinnan støðugt verður eggjað til at minka um kostnaðarstøðið;  økja um stovnsgrundarlagið og til at økja um virðisøkingina




*Kelda: Búskaparráðið 2014 og egnar útrokningar*

© SYNTESA PARTNERS & ASSOCIATES – INNOVATION TO MARKET

# Ymiskar útlutingar skipanir

**Útlutingarskipanir av rættindum verða vanliga býttar í:**

- **Politisk útlutan**, har mynduleikin ásetur hvør skal hava rættindini
- **Jøvn útlutan**, har allir aktørar fáa eins stóran lut í rættindunum
- **Søgulig rættindi**, eisini nevnt "grandfathering", har verandi aktørar í vinnuni fáa rættindini
- **Uppboðssøla**, har rættindini fara til hægstbjóðandi

**FAO mælir til at taka hædd fyri**

- Samfelagslig endamál við fiskivinnuni
- Viðkomandi søguligum atlitum og siðvenju í fiskiveiðuni
- Viðkomandi sosiala, mentanarliga og búskaparliga umhvørvið
- Týðandi táttir í fiskastovnum (TAC) og vistfrøðiskipanini (ecosystem approach)

*Kelda: A Fishery Manager's Guidebook, p.278 Cochrane, K.L. & Garcia S. K., FAO 2009*

© SYNTESA PARTNERS & ASSOCIATES – INNOVATION TO MARKET

# Týdningurin fyri Føroyar í mun til kappingarlond




*Kelda: Tøl, ið tala, Fiskimálaráðið 2016*

Um tað avleidda virksemi verður tikið við, er virðisøkingin uml. 40% av BTÙ

© SYNTESA PARTNERS & ASSOCIATES – INNOVATION TO MARKET

# Arbeiðssetningurin um marknaðargrundað

**<u>Andsøgn millum</u>**

- at skipa eina marknaðargrundaða skipan (punkt 7), har tilfeingisrentan gerst so optimal sum gjørligt (punkt 6)

og

- at rættindini skulu vera á føroyskum hondum (punkt 4), ikki savnast á fáum hondum og vera kring landið (punkt 8)

**<u>Somuleiðis millum</u>**

- at "farast skal frá privatari sølu av loyvum og fiskirættindum", og "kann ikki gerst ogn hjá privatum..."

og

- eina dynamiska skipan við handli og tillagingum í vinnuni í mun til møguleikar og marknaðarvirði

© SYNTESA PARTNERS & ASSOCIATES – INNOVATION TO MARKET

# Mannagongd við innbodnari lisitation

1

- Pre-kvalifisering
- Verandi og nýggir “aktørar” kunnu bjóða seg fram

2

- Boð verða latin inn
- Eftirmett av serfrøðingabólki í mun til endamál við nýskipanini, m.a. MEY

3

- Brúksloyvi verða latin fyri t.d. 15 ár
- Tilfeingisgjald verður goldið, t.d. við íblástri frá kolvetnisskattalógini og/ella í mun til virðisskapan

# Innboðin lisitatión

**Ein innboðin lisitatión í fiskivinnuni kann t.d. fevna um fylgjandi parametrar:**

- Íløgur í verandi stovnar (stovnsrøkt, t.d. við at brúka rist o.a.)
- Royndarfiskiskap eftir nýggjum fiskasløgum ella á nýggjum leiðum
- Royndarfiskiskap við nýggjari útgerð og tøkni
- Meirvirking /-góðsking av fiskatilfeinginum
- Útbúgving av sjófólki, t.d. siglingartíð
- At taka alt í land – tvs. eisini livur, rogn, innvøl, høvd o.s.fr.
- Størst møguligt keyp frá føroyskum undirveitarum

Tey sum bjóða skulu vísa á hvussu tey vilja brúka tilfeingisrentuna í brúkstíðarskeiðnum í mun til effektiviseringar, nýskapan o.a.

© SYNTESA PARTNERS & ASSOCIATES – INNOVATION TO MARKET

# Virðisketa og tilfeingisgjøld



# Innboðin lisitatión

**Fyrimunir:**

- at ein støðug menning fer fram av stovnsrøkt av verandi og nýggjum stovnum og leiðum
- at ein støðug menning fer fram av kostnaðar optimering
- at ein støðug menning fer fram av virðisøking og í mun til at troyta alt tilfeingið
- harvið vil tilfeingisrentan støðugt hækka
- man kann bjóða ein %part av TAC út hvørt ár

**Vansar:**

- at trupult er hjá nýggjum aktørum at sleppa inn í fiskiskapin
- at tað almenna kann fáa minni inn í tilfeingisgjaldi í mun til beinleiðis uppboðssølu

© SYNTESA PARTNERS & ASSOCIATES – INNOVATION TO MARKET

# Uppboðssøla

**<u>Ein perfektur marknaður er sermerktur við:</u>**

1) Perfekt marknaðar vitan (allir aktørar gjøgnumskoða marknaðin) 
2) Eingin aktørur er stórur nokk til at kunna avgera prísin 
3) Eingin almenn íblanding í marknaðin 
4) Eingin forðing fyri at nýggir aktørar kunnu koma inn á marknaðin 
5) Javnbjóðis møguleikar fyri at gagnnýta framleiðslutólini 
6) Profit optimering (fyritøkurnar royna at skapa størst møguligt avkast) 
7) Eingir eksternalitetir (t.d. ávirkan á umhvørvið o.l.) 

© SYNTESA PARTNERS & ASSOCIATES – INNOVATION TO MARKET

# Uppboðssøla

**Fyrimunir:**

- at hon tryggjar eina tillaging av vinnuni, soleiðis at vinnan verður optimerað
- at tað almenna fær alla tilfeingisrentuna (treytað av, at uppboðssølan er vælvirkandi)

**Vansar:**

- avmarkar harvið incitamentini til at gera innovativar íløgur
- minkar samstundis um fíggjarmøguleikarnar
- leggur eitt lok á incitamentini til at økja um rentuna
- trupult at skipa eina uppboðssølu, soleiðis at hon einans tekur tann partin av tilfeingisrentuni, sum hon skal taka og letur tað vera eftir í vinnuni, sum skal vera eftir í vinnuni

© SYNTESA PARTNERS & ASSOCIATES – INNOVATION TO MARKET

# Niðurstøða

- Neyðugt at eymerkja endamál
- Tilfeingisrentan skal maksimerast
- Marknaðargrundað útluting í mun til hvussu vinnan ætlar at brúka tilfeingisrentuna til økta virðisskapan
- Tilfeingisgjøld skulu rindast, men í mun til virðisskapan í Føroyum
- Føroysk viðurskifti lúka ikki treytirnar fyri eina vælvirkandi uppboðsølu



© SYNTESA PARTNERS & ASSOCIATES – INNOVATION TO MARKET



# TAKK FYRI

SYNTESA
INNOVATION TO MARKET